# Morgunmatur á flesini

**Í sambandi við 45 ára stovningardagin hjá Tórshavnar Froskmannafelag, skipaðu tey fyri morgunmati millum klokkan 10 og 12 leygarmorgunin á flesini við Hoyvíkshólm**

STOVNINGARDAGUR

*Orð: Solby A. Eliasen*
*Myndir: Jens Kr. Vang*



*Tá tað vóru mest fólk í senn á flesini, mundu tey vera um eini 25*

Heri Andreassen, formaður í Froskmannafelagnum sigur, at tey møttust í Hoyvík klokkan tíggju og vórðu síðani førd út á flesina í nýggja bátinum hjá felagnum.

– Tað vóru heilt nógv fólk – eina løtu mundu tað vera eini 25 ella meira í senn á flesini, sigur Heri.

Morgunmaturin var sum sagt frá 10 til 12, og tá tað var liðugt, lupu tey, sum eftir vóru á bláman. Bæði menn sum kvinnur. Tey ruku síðani eitt fitt petti, áðrenn tey vórðu tikin upp og førd inn á land.

Orsøkin til at Froskmannafelagið valdi henda øðrvísi háttin at gera vart við teirra stovningardag, er, at tey ynskja at gera felagið meiri sjónligt.

Heri Andreassen sigur, at sum í øllum áhugafeløgum, so hevur eisini Froskmannafelagið sínar upp og niðurtúrar.

– Vit vilja hava meiri lív í felagið, og tað hevur víst seg, at tað gongur væl fyri tíðina, so tað er sera hugaligt.

Seinni um kvøldið varð skipað fyri veitslu.

Tað sum var so serligt við veitsluni, var, at tveir limir, sum vóru við til at stovna felagið av fyrstan tíð, vóru við. Teir eru Heri Mørkøre og Karl Johan Fosså. Hesir báðir og Knúd Bjørk vórðu gjørdir til heiðurslimir. Á veitsluni fingu teir so handað hvør sína klokku úr føroyskum gróti við búmerkinum hjá felagnum í.

Hesa heiðursgávuna vóru teir sum vera man sera fegnir um, og kanska var tað serliga stuttligt hjá Hera Mørkøre, tí hann hevur teknað búmerki hjá Tórshavnar Froskmannafelag. Knúd Bjørk er framvegis virkin í felagnum eftir 40 ár sum limur.

Tað mundu vera um fimti fólk til veitsluna, sum var hildin í felagshølunum í Tórsgøtu. Heri sigur, at tá hugsað verður um, at felagið hevur 140 skrásettar limir, so kann tað metast ikki at vera nógv, men tað var eisini so nógv annað á skránni leygarkvøldið, so tað kann hava verið orsøkin til tað.



*Fólkini vórðu førd út á flesina við Hoyvíkshólmin í nýggja bátinum hjá Tórshavnar Froskmannafelag*

Eykaaðalfundur hjá Føroya Arbeiðarafelag:

# Nýggjur eftirlønargrunnur stovnsettur

**Á eykaaðalfundi hjá Føroya Arbeiðarafelag leygardagin bleiv einmælt samtykt at stovnseta ein nýggjan eftirlønargrunn**

EFTIRLØN

*Solby A. Eliasen*



*Nýggjur eftirlønargrunnur varð stovnsettur á eykaaðalfundi hjá Føroya Arbeiðarafelag leygardagin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Allir limir, sum vóru á eykaaðalfundi leygardagin tóku undir við at seta ein nýggjan eftirlønargrunn á stovn. Samtykt varð at seta 25 milliónir sum stovnsfæ.

Ingeborg Winther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag sigur, at tað bert manglar Tryggingareftirlitinum at góðkenna tað.

Tað, at ein nýggjur eftirlønargrunnur er stovnsettur, merkir, at allir limir felagsins hava rætt til eftirløn úr grunninum, tá tey eru farin upp um 60 ára aldur.

Men Ingeborg vísir á, at tað tekur langa tíð at byggja ein tílíkan grunn upp.

– Tað tekur eitt heilt ættarlið at byggja ein eftirlønargrunn upp, so tað sigur seg sjálvt, at tað verður ikki nógv til limirnar, sum í dag eru millum 40 og 50 ára aldur og uppeftir. Men hetta er so altíð ein byrjan, og tað kemur at verða betur fyri limirnar í framtíðini, sigur Ingeborg Winther.

Hon sigur eisini, at hetta merkir ikki, at fólkapensjónin skal avtakast, tí tað kemur ikki at verða nóg mikið til limirnar bert við nýggja eftirlønargrunninum.

Tað kemur at verða munur á, hvat hvør limur fær kortini. Tað vil siga, at teir limir, sum hava eina inntøku á 200.000 til 250.000 og uppeftir fara at fáa væl meiri í eftirløn enn tey lægri løntu. Ingeborg sigur, at soleiðis vil tað altíð verða.

– Sjálvandi er tað harmiligt, men tað er so, og við hesum nýggja grunninum royna vit at geva okkara limum betri sømdir, tá tey eru farin um eftirlønaraldur, sigur Ingeborg, sum heldur at tað einasta rætta er eitt nú Samhaldsfasti eftirlønargrunnurin.

– Um hann var fyri øll, ja, so var ongin munur, sigur formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag.

Hesin eftirlønargrunnurin varð stovnsettur, tí limir felagsins síggja ongan annan útveg.

– Um vit ikki gera okkurt tílíkt sjálvi, so fáa vit bara okkurt smoygt niður um høvdið av politikarunum. Og tað vilja vit ikki hava, sigur Ingeborg Winther at enda.



# Fúlarheitir



*Saman vóru tær tríggjar ein ógvuliga væl smurd spælimaskina. Hóast premierunervarnir sótu uttan á klæðunum var spælið lætt og inniligt. Dirvið eiga tær so sanniliga.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Leiklistarligt topavrik í Ginu søgum á Meiarínum**

UMMÆLI

*Heri á Røgvi*

Kusa, Vagina, klovin, kunta, sprellið eru bert nøkur av teimum nøvnum, sum stóra miðpunktið í sjónleikinum Ginu søgur hevur. Sigur tú tey nóg ofta, hevur tú eisini fingið tað mesta av leikinum við, men langt frá alt. Vagina monologues skuldi annars verið rættiliga greitt. Hetta var leikurin, sum framprovekerandi hevur fingið miðlar og onnur at hugsa um og taka upp eitt av teimum sokallaðu tabuunum. Marknaðarføringin var í øllum ógvuliga greið. Ógvusligt, men við einum ávísum broddi, varð gjørt greitt, at nú skuldi tabuið fellast á Meiarínum. Stór orð, sum krevja at okkurt býr aftanfyri.

Kvinnuliga kynsgøgni verður ikki nógv umtala. Ikki sum mannligi starvsfelagin. Òteljandi filmar, leikir, skemtisøgur og ikki minst sangir plasera mannliga gøgni á fremsta røð í teirri vesturlendsku mentanini, har alt meira ella minni er loyvt. Við fleiri sjónvarpsrásum kanst tú lættliga sita eitt heilt kvøld og ikki hoyra um annað enn mest viðurkenda libidoina. Ein hálvfems minuttir leikur við honum sum evni hevði neyvan verið nakað tabuhóttandi.

Satt at siga kenni eg ikki ein einasta sang um ginuna, ongar sjónvarpslýsingar við paralellum. Tað er ikki tað, ið tú hoyrir mest til. Spurningurin er so: Er saknar á tí?

Ringt at siga, hví eg endaði sum áskoðari, men nú eg eri við fatið, so lat meg bara hyggja at.

Ein og hvør góður leikur skal eg geva tær ein lærdóm. Einki betri er enn at læra nakað um seg sjálvan. Leikurin er í sínari stóru heild sera einfaldur. Tríggir kvinnuligir leikarar sita á pallinum – meira ella minni eggjandi klæddar – og siga frá søgum. Søgur sagdar av kvinnum fyri kvinnur. Tónleikur, pallur og annað spæla aðru violin til frásøgnina og vaginuna.

Frásøgnirnar eru fyri tað nógva skemtiligar, og bert fyri hesa orsøkina kann leikurin vera verdur at síggja. Við skemtinum verður latið upp fyri, at áskoðarin kann mótttaka tey mongu boðini frá kvinnuligu frásagnunum. Farið heldur at lurta eftir teimum heldur enn at lesa um tær her, tí tað er nógv betri fortalt.

Kristina Hansen vísti framúr gott spæl sum tann meiri vitandi, og virkar óvanliga væl uppløgd í leikinum. Birita Mohr og Gunnvá Zachariasen eru saman við Kristinu ein vælsmurd spælimaskina. Við einum eygnakasti, ið ikki at fara skeivur av, eru tær skemtiligar, fúlar, álvarssamar, stønnandi og inniligar í hálvfems minuttir. Leiklistarligt topavrik. Dimensiónirnar eru kortini eitt sindur ov kendar. Birita Mohr er tann eldra, Gunnvá Zachariasen tann unga. Næstu ferð kunnu teir kanska bróta heilt ígjøgnum á pallinum.

Hesin amerikanski moralurin um tann æviga vakurleikan er forkastiligur. Tey lítlu moraliserandi pettini vísa týðuliga hvørjum landi leikurin er úr. Hóast evnið og kanska eru landmám í frælsisgerðingini, er poetisku niðurløgini ikki at duga at steðga, meðan leikurin enn er góður.

Leikaraavrikini eru framúr. Tær tríggir vinda burturúr leikinum og ivalyest eisini sær sjálvari. Pallsetingin, umseting, leikstjórn v.m. alt í betra endanum. Frásøgnin er berandi elementið, og vit mugu takka fyri teirra dirvi.

Fer tú til leikin, lat so fordómarnar vera eftir við hús, og tak tín trúgvasta felaga við. Hetta er ikki fyri øll, men fyri nógv kann hetta vera alt. Hvør hevur sína søgu.

**Tabu?**

Salurin leygarkvøldið var væl fyltur. Hóast tey flestu mestur vóru innboðin, segði hetta eitt sindur um tann áhuga, evnið og leikurin njóta gott av.

Har sótu vit so øll somul. Láturin var so hjartaligur í løtum og samhugurin líka so, tá tað var neyðugt. Vit sótu øll og lýddu á – her var einki undarligt. Leikurin er stuttligur, øðrvísi og dámligur hjá nógvum.

Í leikskránni stendur at lesa um tabu. Hetta er nakað forboðið nakað, sum vit seinni hava latið í ein enn sterkari ham. Fult hús á Meiarínum. Er tað so tabu? Endaliga styrkismetingin má liggur hjá hvørjum einstakum, tí tað er ymiskt, hvat søgurnar siga.



*Kristina Hansen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Gunnvá Zachariasen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Birita Mohr*

*Mynd: Álvur Haraldsen*